

# Ver við til at mynda okkara nýggja toymi!
## 4 spennandi størv á eldraøkinum

Í samstarvi við Nærverkið og Tórshavnar kommunu verður farið undir verkætlan at samskipa og menna tilboðini til eldri, heimabúgvandi borgarar og tey, ið búgva á eldrabústovnum í Tórshavnar kommunu.

**Lýst verður eftir:**
- leiðandi fysioterapeuti við tilvísing til Lágargarð á lønarbrøki 1.0
- einum fysioterapeuti við tilvísing til Tjarnargarð og á lønarbrøki 1.0
- einum ergoterapeuti við tilvísing til Ellisheimið á lønarbrøki 1.0
- einum heilsurøktara við tilvísing til Lágargarð á lønarbrøki 0,5

Við verandi terapeutum í Nærverkinum og komandi fysioterapeuti í Heimavitjanartænastuni hjá Tórshavnar kommunu verða sjey fólk í toyminum.

Talan er um føst størv.

Leiðandi fysioterapeuturin samskipar venjingina. Leiðarin hevur tilvísing til Lágargarð, er leiðari á dagstovninum á Lágargarði og virkar sum toymisleiðari.

Verkætlanin skal eftirmetast, tá eitt ár er umliðið, og dentur verður lagdur á skjalfestan av árini, ið venjing hevur fyri málbólkin.

**Førleikar hjá leiðaranum í toyminum:**
- er útbúgvin fysioterapeutur
- hevur eftirútbúgving innan leiðslu og fyrisiting
- hevur royndir innan starvsfólkaleiðslu
- kann menna og samskipa fyrisitingarligar og tvørfakligar uppgávur
- hevur kunnleika/royndir innan fíggjarstýring
- hevur breiðar fakligar royndir. Skal kunna visitera og meta um samlaðu støðuna
- hevur góð samstarvsevni
- sær møguleikar og avbjóðingar í nýggju verkætlanini

**Førleikar hjá ergo /fysioterapeuti:**
- er útbúgvin ergo /fysioterapeutur
- hevur royndir innan eldraøkið
- kann tilrættisleggja og fremja venjingarætlanir
- kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- kann undirvísa starvsfólki innan arbeiðsrørslur
- kann vegleiða um hjálpartól

**Førleikar hjá heilsurøktara:**
- er útbúgvin heilsurøktari
- hevur royndir innan eldraøkið
- kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi

**Krøv til størvini:**
- autorisatión sum fysioterapeutur/ergoterapeutur
- áhuga í at arbeiða innan eldraøkið
- góð samstarvsevni

**Vit bjóða tær:**
- eitt dynamiskt og fleksibult arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum og menningarmøguleikum
- at vera við til at bróta upp úr nýggjum, og soleiðis hava møguleika at seta títt persónliga fingramerki á toymið og avrik tess

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini og verkætlanina við at venda sær til:
- Metu av Fløtum, leiðara á Lágargarði, á telefon 35 76 88 ella 21 44 96
- Idu Sørensen, leiðara á Ellisheiminum, á telefon 31 73 39
- Hensiu Einarson, leiðara á Tjarnargarði, á telefon 30 20 75 ella 21 40 75
- Maritu Tórsheim, økisterapeuti, á telefon 76 21 05

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við neyðugum prógvi og møguligum viðmæli skal sendast til Lágargarð, Stoffalág 84, Postsmoga 1188, F0 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 20. mars 2009.

NÆRVERKIÐ
Meginskrivstovan

Tórshavnar kommuna


**STØRV Á KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚSI**
**- BIOANALYTIKARAR OG PORTØRAR-**

Portørstarv
Frítíðaravloysarar til Bioanalytikarar og Portørar

Les meira um hesi størv á heimasíðu okkara: www.ks.fo



KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

